tveimum innb. mikrofonum (Magnetic Pickup og Piezo Pickup), einum 15 W VOX forsterkara og fótstativi til sølu. Ljóðar einastandandi. Nýprísur 6500 kr., til sølu samlað fyri einans 4500 kr.
*Saltangará, tlf. 260590*

**HIGH-END ANLEGG**
Hondgjørt í Danmark. Les meira á www.Holfi.dk Tilboð gevst, send mail til.
*fo_hifi@hotmail.com*

**EL-BASSUR YNSKIST**
Hevur tú ein gamlan 4-streingjaðan bassguittara liggjandi? Eg kann keypa hann frá tær. Tað einasta tú skalt gera, er at ringja
*tlf. 222797*

## Út- & Sjónvarp

**SJÓNVARP TIL SØLU**
26" Philips sjónvarp til sølu fyri kr. 2.000,-
*Tlf. 318888 eftir kl. 18*

## Ymiskt

**SIEMENS ME45**
til sølu, 10 mán gomul, í góðum standi, ladari-headsett fylgir við.
*Ring á telefon 224017*

**LOPPUMARKNAÐUR**
Loppumarknaður verður leygardagin 13. mars, kl. 10.00-14.30 í húsum okkara í Vágsbotni. Vit vóna, at nógv koma inn at stuðla okkara arbeiði.
*Reyði Krossur Føroya*

**TRAPPA**
Loftstrappa, longd 3,3 m, breidd 0,76 m til sølu fyri kr. 5.000,-
*Tlf. 588016 (best eftir kl. 17)*

**LOPPUMARKNAÐUR!**
Hevur tú nakað, ið bara liggur og samlar størv, ring 223023 ella 266829 og vit avheinta tingini.
*2 hhb á Handilsskúlanum í Havn*

**VINDEYGU TIL SØLU**
2 nýggj liðugt viðgjørd hvít H-vindeygu stødd, 50 x 90 til sølu.
*Tlf. 211511*

**DECRA TAK TIL SØLU**
Óbrúkt grønt decra tak, ca. 100 kvadrat, bíliga til sølu.
*Tlf. 211511*

**TIL SØLU**
1 grøn wc-kumma og 1 hvítt vask við blandingsbattarí til sølu fyri kr. 600,-
*Tlf. 315325*

**NOKIA 3300 TIL SØLU**
Ein nýggj og sera vælhildin fartelefon er til sølu fyri kr. 2.000,- Telefonin hevur radio, mp3, GPRS, Java, Mms o.m.a.
*tlf. 319030*

**TIL SØLU**
2 stk. Siemens C35 + ladara, 1 stk. Nokia 3330 + ladara, 1 stk. Motorola + ladara (defekt) til sølu fyri 800 kr.
*Tlf. 222610*

**2 RADIATORAR**
dupultir, 100x55, 300 kr. hvør.
*Tlf. 316006*

**TIL SØLU**
Nýggjur flúgviklárur, fjarstýrdur flúgvari við allari neyðugari útgerð til sølu. Prísur 4.000 kr. Sí mynd á www.rc-hobby.fo
*Tlf. 210525*

**TIL SØLU**
1 stk. brúsubakki (hvítur) bíliga til sølu.
*Tlf. 583388*

**STÓRT FAMILJUTILTAK**
verður í Studentarskúlanum leygardagin 13. mars. Nógv ymist verður á skránni s.s. bilvask, loppumarknaður, pony ríðing, bóltakast o.m.a. Byrjað verður kl. 13.00. Til frama fyri námsferð hjá
*02z í Hoydølum*

**NOKIA 6510**
til sølu. Billadari og eyka cover fylgja við. Nýtt battarí.
*Tlf. 217475*

**GARAGUHURÐ TIL SØLU**
av slagnum Lindab 2500 x 2150 mm. Hvít v/ motori. Nývirði 12.600, nú 11.800 kr.
*Tlf. 217686*

**GARAGUHURÐ TIL SØLU**
Grawford 2750 x 2100 mm, hvít v/ fyllingum og 3 stk. rútar. Motorur kann vera við fyri 18.000. Nývirði 21.500.
*Ring á tlf. 263181*

**TIL SØLU**
Ein treningsbonkur fyri 700 kr.
*Ring á tlf. 220405*

**BROTFLÍSAR TIL SØLU**
40 kvm. av norskum brotflísum fyri 175,- kr. pr. kvm. og 25 kvm. av reyðbrúnum brotflísum fyri 150,- kr. pr. kvm.
*Tlf. 228371*

**BRENNIOVNUR**
Brenniovnsketil fæst við at avheinta hann.
*Tlf. 310404/216556*

**VINN STÓR EGG**
Við at skriva EGG á eitt sms-boð og senda tað til 1441, ert tú við í kappingini um 20 stór føroysk páskaregg. Sí meira á portal.fo og Svf lýsingunum. Til ber at senda fleiri sms-boð.
*Báran*

**PÁSKAREGGJATOMBOLA**
Uppi við fótbóltsvøllin. Hvønn leygardag kl. 10-13 og 19-22. Í ár – 2004 – verða íalt 3000 egg at vinna. 50-ari verður, har tú kanst vinna eitt stórt føroyskt egg. Gjaldast kann við FR-Visa korti.
*Báran*

**YNSKIST**
Er tað nakar, ið eigur eitt Fax bíliga til sølu. Vinarliga ring
*422700 eftir kl. 18*

**H71 PÁSKAREGGJATOMBOLA**
Í samband við 1. deildar dystin H71-Kyndil sunnudagin 14. mars kl. 16.00 hava vit páskareggjatombola í Hoyvíkshøllini. Eisini selja vit kaffi og køkur.
*H71*

**BRÚKTUR OLJUTANGI**
Útitangi til sølu.
*Tlf. 422228*

**TIL SØLU**
Eitt nýtt óbrúkt battarí til Siemens C35 og ein lummi til sølu fyri 150 kr., og ein Nokia 3330 til sølu.
*Tlf. 312562*

**TIL SØLU**
Motorola við camera, 69.000 color, 3 mánaðir gomul, 2.800 kr.
*Tlf. 372744*

**HYGG HER**
Sim-kort, ongatíð brúkt, til sølu fyri 200 kr. Ringi
*Tlf. 322567 ella 257983*

**SUÐUROYINGAR**
Okur móttaka lutir, klæðir o.a. hvønn týs- og tórsdag kl 18.00. Alt hevur áhugað. Loppumarknaður verður í Skótahúsinum 28. mars.
*Skótarnir í Vági*

**FLYTIESKJUR**
seljast fyri 10 kr. stk.
*Tlf. 321640, 264909, 521640 ella fax 211580*

**NÝGGJ FLAGGVINDEYGU**
úr mahogni, málaði innan 3 ferðir við hvítum gl. 50.
5 stk. vindeygakarmar 90,5x135,5 cm.
4 stk. vindeygakarmar 86,0x134,0 cm.
1 stk. 90,0x120,0 cm.
1 stk. 44,0x85,5 cm.
1 stk. 85,5x79,0 cm.
1 stk. 51,0x46,0 cm.
1 stk. 47,0x135,5 cm.
1 stk. 80,0x110,0 cm.
4 stk. 97,0x100,0 cm.
Skal seljast samlað. Ring og hoyr um prís á
*Tlf. 212432 eftir kl. 17.00*

# Føroyingar hugtaka aftur í Íslandi

**Fleiri føroysk tiltøk eru í Íslandi í hesum døgum. Birigir Enni og onnur gera mat, føroyski bólkurin Strange Fruit spælir og hvar ein annars vendir sær, so eru Føroyar so ella so frammi í miðlunum**

MENTAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Føroyskir dagar eru á Fjørðukrónni og Vestmenn hava leikt og nú um vikuskiftið leikar bólkurin Strange Fruit, ið er nýggjur føroyskur bólkur. Bólkurin er settur saman av dugnaligum tónleikarum ymsastaðni úr Føroyum. Tróndur Enni leikar bass, Hjalmar Magnussen syngur og leikar guitar, Mikkjal Hvannastein leikar guitar, Dánjal Jákup W. Holm trummur og Magni Husgaard ljómborð, men á íslandsferðini er tað Magnus Johannesen, ið leikar ljómborð.

Birgir Enni og Havgrímur Johannesen gera føroyskan mat og tað ljóðar, at tað higartil hevur gingið sera væl við føroysku døgunum og nógv fólk vitjar. Á Viking gistingarhúsinum nærhendis er listaframsýning við føroyskari list.

Í bygdini Eyrarbakki, einar 50 kilometrar eystanfyri Reykjavík, verður skipað fyri føroyskum hugnakvøldi í kvøld. Morentza Poulsen ger mat og Gurli Hansen syngur.

### Føroyar í miðlunum

Íslendingar eru enn hugtiknir av tí, ið føroyskt er, so føroyska bylgjan hevur ikki lagt seg enn. Í miðlunum fær ein ikki vent sær, so er okkurt um Føroyar at síggja ella hoyra. Nú er amerikanska pizzafyritøkan Domino farin á lýsingarferð og her verða Føroyar nýttar og sagt verður, at íslendingum dámar væl at hoyra føroyskt! And they are right!, verður staðfest.

Enski gentubólkurin Sugarbabes kemur til Íslands í apríl og DV spurdi fimm fólk um bólkin. Ein teirra var Eivør Pálsdóttir, men hon spurdi hinvegin, hvør hesin bólkur var. Hetta svar er høgt í metum hjá teimum, ið ikki halda so nógv um enska popbólkin, ið sigst vera ein sonevnd "døgnfluga".

Spurnarkapping millum skúlar er í íslendskum sjónvarpi og ein spurningur har var, hvaðani Eivør er í Føroyum. Ein bólkur svaraði Tórshavn, men annar svaraði úr Gøtu, sum rætt er.

– Tað ger ikki mun, hvørt ein hyggar at sjónvarpi, hoyrir útvarp ella lesur bløð; Føroyar eru allastaðni, sigur íslendski føroyavinurin og heimildarmaður okkara, Jens Guð.

# Havnarkórið í Carnegie Hall

Havnarkórið hevur óiva fingið sína størstu avjóðing nakrantíð. Í heyst er kórið bjóðað til New York at framføra Elias hjá Felix Mendelssohn í glæsiligu og víðagitnu konserthøllini: CARNEGIE HALL. Ikki kann sigast annað, enn at hetta veruliga er ein álitisváttan og óiva størsta altjóða tiltakið hjá kórinum nakrantíð. Kórleiðarin, íslendingurin Gardar Cortes, hevur saman við Havnarkórinum, operakórinum í Íslandi og kórum úr eitt nú Noregi, Danmørk og Svøríki, fingið hin stóra heiðurin at framføra hetta megnarvekið. Gardar Cortes er komin at venja kórið í vikuskiftinum og fer avstað aftur mánadagin.



*Havnarkórið sang á Vertshúsinum seinasta sunnudag*

**Soleiðis sær venjingarætlanin út:**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag 12 mars : | 19.00 – 22.00 | |
| Leygardag 13 mars : | 09.30 – 12.00 | |
| | 13.30 – 17.00 | |
| Sunnudag 14 mars : | 15.00 – 18.00 | |



## HEILSANIR



**Góða elskaða Gunnvá**
Nú gjørdist tú endiliga 18 ár ha? So nú verður tað ball, ball, ball :o) Knuz
**Anna**



**Hey Gunnvá**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum. Ja ja, gott at onkur dugur at hava tað stuttligt ... ella... Alt tað besta.
**Ynskir F4**



**Góða Anna Sára og Beata**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum. Takk fyri at tit altíð eru so fittar og blíðar.
**Kærar heilsanir omma, abbi og Katrina**



**Góða Jóna**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag.
**Omma, abbi og mostir**



**Góði Fríðfinnur**
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum í dag.
**Ynskja mamma og babba**



**Góði Hanus**
Lukku og gleði á tínum 1 ára degi. Jesus pápi veri hjá tær.
**Ynskja omma og abbi í Havn**



**Allarbesta Jóna**
Lukku og gleði á tínum 1 ára degi. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Ynskir Jonna-omma**



**Góða elskaða Rebekka**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum 13. mars. Nú ert tú ein stór didda. Vit elska teg
**Heilsan mamma og babba**



**Góða Beinta**
Hjartaliga tillukku við 40 ára degnum. Tú ber bara aldurin væl. Okur feiðra føðingardagin á damufrokostinum leygarkvøldið haha...
**Heilsan Carol**



**Góði beiggi**
Lukku og gleði á tínum 5 ára føðingardegi í dag.
**Ynskja gumma, Marius, Brian og Kirten**






**Góða elskaða Jóna**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða Daniella**
Hjartaliga tillukku við 10 ára degnum og vóna tú fær ein góðan føðingardag.
**Ynskir mamma**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á middegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.......................................................................................
.......................................................................................
.......................................................................................
.......................................................................................
.......................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: .....................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«